# Land teirra brekaðu

**Seinnapartin hósdagin vórðu dyrnar hjá ALV í Smiðjugerði latnar upp**

STOVNUR
*Orð: Ingrid Bjarnastein*
*Myndir: Jens Kr. Vang*



*Páll á Reynatúgvu, landsstýrismaður í almannamálum, helt røðu hósdagin í sambandi við, at sjálvsognarstovnurin ALV, lat upp nýggj hølir í Smiðjugerði*

Seinnapartin hósdagin var móttøka í nýggju hølunum hjá ALV í Smiðjugerði.
1. september verður byrjað við virkseminum hjá ALV. Tá verður farið undir við Vinnuskeiði og Verkstaði.

Heilt fitt av fólki var samankomið til móttøkuna. Fyrst bjóðaði Bartal Kass, formaður í stýrinum fyri ALV vælkomin, og síðani helt landsstýrismaðurin í almannamálum, Páll á Reynatúgvu eina røðu. Í røðu sínari kom landsstýrismaðurin inn á, at Føroyar skulu eisini verða land teirra brekaðu, og tað skal betri kunning og meira tilvitan um tey brekaðu til her á landi.

– Eg vil heita á arbeiðsmarknaðin um at skapa rúm fyri teimum, sum vegna eina ella aðra orsøk hava verið noydd til at fara av arbeiðsmarknaðinum ella á ein ella annan hátt ongantíð er komin á arbeiðsmarknaðin, segði Páll á Reynatúgvu millum annað.

## Væl nøgd

Kristina Larsen, sum er fyristøðukvinna í ALV, sigur, at tey eru væl nøgd við hølini.

– Vit byrja so smátt 1. september, og so aftaná ein mánað, so skuldi virksemið av álvara verið byrjað, sigur Kristina Larsen.
Tá verður byrjað við Vinnuskeiði og Verkstaði.

Vinnuskeiðið umfatar tvey verkstøð. Hetta vinnuskeiðið er fyri arbeiðstarnað, sum eiga at klára seg úti á arbeiðsmarknaðinum.

Hesi bæði verkstøðini verða margfaldsstovan og køkur.

Á hesi sonevndu margfaldsstovu verður skipað fyri arbeiði, sum umfatar teldur, kopimaskinur og øðrum hesum líknandi. Fólk kunnu so koma innar og bíleggja kopi, tekstir, uppseting av sangum og so framvegis. Her koma tey arbeiðandi at læra at fáast við teldu, taka ímóti bíleggingum og øðrum sum hoyrir hesum arbeiði til.

Hin verkstaðurin verður ein køkur. Her koma fólkini at fáast við matgerð. Ætlanin er at gera matpakkar og lættari máltíðir, sum síðani skulu út av húsinum. Harafturat verður undirvíst í mat og kostvegleiðing.

Hitt virksemi, sum byrjað verður við á ALV, er klædna- og sniðverkstaðurin. Hetta er fyri fólk, sum ein ikki væntar klára seg á arbeiðsmarknaðinum. Tað verið seg avlamispensionistar og fólk, sum ikki hava útlit til at klára seg – rørslutarnað ella lættari sálarliga sjúk.

Seinni í heyst ella í vetur verður eisini avlamisarbeiði fyri pensjionistar á ALV. Hetta er fyri fólk, ið eru verri fyri, og talan er meira um hugna og lættari handverk.

Í fyrsta umfari er pláss fyri umleið 20 fólkum á ALV, og seinni verða fleiri tikin inn.

Hølini í Smiðjugerði eru ógvuliga snotulig. Ljós og rúmlig. So tað er ikki so løgið, at sjálvsognarstovnurin ALV er nøgdur við nýggju umstøðurnar.



*Kristina Larsen, fyristøðukvinna, avmyndað inni í seymistovuni*



*Jákup Lindenskov, fyrrverandi formaður í stýrinum fyri ALV*





*Inni í nýggju hølunum hjá ALV er alt gjørt handicap-vinarligt. Ein sleppur lættliga framat við rullustóli um tað skal vera*



*Doris Hansen, fyrrverandi formaður í MBF*



*Bartal Kass, formaður í stýrinum fyri ALV, saman við Páll á Reynatúgvu*

# Vøddamýkjari til arbeiðsfólkið



*Á Tavuni í Leirvík vitjar ein vøddamýkjari einaferð um vikuna fyri at mýkja vøddarnar hjá arbeiðsfólkunum*

*Savnsmynd*

**Tavan í Leirvík er farin undir nakað slóðbrótandi innan føroyska fiskivinnu. Einaferð um vikuna kemur nevniliga ein vøddamýkjari á virkið, sum mýkir vøddarnar á arbeiðsfólkunum**

FISKIVINNA
*Ingrid Bjarnastein*

Leirvík: Einaferð um vikuna fær Tavan í Leirvík vitjan av Una Rasmussen í Søldafirði. Uni er fyri stuttum útbúgvin fysioterapeut, og ein av fyrstu uppgávum hansara er at gera arbeiðslívið lættari hjá arbeiðsfólkunum á Tavuni.

– Hetta hjálpir ótrúliga væl, og arbeiðsfólkini eru ógvuliga væl nøgd við hetta tiltakið, sigur Sólmai Johannesen, arbeiðsformaður á Tavuni.

Hesin nýggi tátturin hevur verið á skránni í eina tíð nú, og tað vísir seg, at nógv á virkinum eru fús til at nýta møguleikan.

– Fiskaarbeiði er hart arbeiði. Ein lyftir, ber og stendur nógv, so herðar, lendar og vøddarnir verða nógv útsettir, greiðir Sólmai frá.

Hon sigur, at tað eru eisini fleiri konur, ið ganga til vøddamýkjara, og hetta fer ofta við nógvari arbeiðstíð, tí tá noyðast tær at koyra aftur og fram til Runavíkar.

– Á henda hátt spara tær tíð, og tað telur nógv hjá einum, sum er tímaløntur, greiðir Sólmai frá.

Hósdagar vitjar vøddamýkjarin, Uni Rasmussen. Arbeiðsfólkini skiftast um at fara upp til hansara, har hann brúkar umleið ein hálvan tíma uppá hvørt arbeiðsfólk.

– Eg hopi, at onnur virkir fara at taka táttin upp eftir okkum, tí hetta riggar væl, og fólkini eru glað fyri hetta, sigur Sólmai Johannesen at enda.

# Frits, Øssur og Heðin í Ribarhúsi

LIST
*Ingrid Bjarnastein*

Í dag letur upp framsýning í Gallrí Ribarhúsi í Fuglafirði. Tað eru teir tríggir, Frits Johannesen, Øssur Mohr og Heðin Kambsdal, ið sýna fram. Framsýningin er opin til 12. september. Opið er gerandisdagar frá 15 – 17.30 og leygardagar frá 11-13.

